
sosialurin

Russisk oljugoymsla norðanfyri Føroyar

Russiska tangaskipið VOLKHOV liggur framvegis fyri akker 7 fjórðingar norðanfyri Føroyar. Tað var verjuskipið FYLLA, sum týsmorgunin í síðstu viku kom fram á 16.000 tons stóra tangaskipið. Tíðliga hósmorgunin sá manningin á TJALDRINUM, at eitt herskip av Kresta II slagnum, ADMIRAL MAKAROV lá hjá tangaskipinum og tók olju. Fríggjakvøldið kom eitt krigsskip afturat fyri at fylla tangarnar. Bæði krígsskipini eru nú farin avstað aftur, upplýsir Marinustøðin.



Henda myndin er tikin fyrrapartin hósdagin av VOLKHOV og ADMIRAL MAKAROV. Bæði VÆDDEREN og FYLLA eru undir Føroyum í løtuni og er myndin tikin úr øðrum helikoptaranum. Hin sæst uttast vinstrumegin.

Umborð á ADMIRAL MAKAROV, sum er góð 6.000 tons til støddar, eru 500 mans. Hann siglir 35 mil um tíman.

Onki ólógligt

Tað er loyvt russiskum skipum, øðrum enn fiskiskipum, at taka olju innanfyri føroyska 200 fjórðinga fiskimarkið. Tó eiga tey at halda seg uttanfyri 3 fjórðinga sjómarkið.

Færøernes Kommando upplýsir, at teir ikki hava havt samband við russarnar. Men nógvar myndir eru tiknar av teimum úr øllum ættum. Annars verður upplýst, at hetta ikki er nøkur sjáldsom hending og tað tykist, sum russiska skipaferðslan við Føroyar er vaksin hesi seinastu árini.

Bæði føroysku og donsku verjuskipini hava eftirlit við russunum, m.a. fyri at fylgja við, um teir dálka havið. Missa teir olju í havið, kann hon lættliga reka móti føroysku strondini.


Tað verður mett, at russiska oljubunkringin stendur í sambandi við flotavenjingar.

TVØRTURUM


1. Slurk
7. Útlendingur
8. Rullast
10 Lækni
11. Ansaði
12. Dáma
13. Mála
16. Heiður
17. Buka
19. Fylgi
21 »Til«
22. Hoyrúgva

NIÐUREFTIR

1. Geografi
2. Dessertur
3. Ímóti
4. Omanlop
5. Fuglur
6. Jólamaður
9. Íðan
12. »Verdens løn«
14. Land
15. Býttling
17. Standa
18. Part
20. Tveir eins



LUDDI



hornið



Vædderen fór út aftur mánamorgunin....

Ætlan ÍSF's var at lata onkran steinhøggara gera eina standmynd av Jógvani Arge, um hann fer frá sum forseti, meðan væl er. Men av tí at hetta verður nakað kostnaðarmikið, ætla teir ístaðin at fáa hann at líta aftur um bak eins og kona Lot gjørdi á sinni.

— * —

Um ÍSF kann kallast Sodoma, so hevði tað verið ógvuliga nærliggjandi at kalla Útvarp Føroya Gomorra.

— * —

Breckstart byrjar aftur 25. september.

— * —

Ikki veit eg, hvat Atli, Vilhelm og Kári vilja siga, men mín meining um:

Sosialismu: tú eigur tvær kýr og letur grannanum eina.

Kommunismu: tú eigur tvær kýr, landið ognartekur báðar og tú fært mjólk.

Fasismu: tú eigur tvær kýr, landið ognartekur báðar og selur mjólkina.

Nasismu: tú eigur tvær kýr, landið ognartekur báðar og tú verður skotin.

Embætismannaveldi tú eigur tvær kýr, landið ognartekur báðar, tekur lívið av aðrari, mjólkar hini og stoytir mjólkina burtur.

Og kapitalismu: tú eigur tvær kýr, selur eina og keypir ein tarv!

Óli í Áarstovu



Tað frættist, at tjóðveldismonnum á Tvøroyri høvdu dámað betur, at Tvøroyrar býráð hevði aborterað heldur enn adopterað Vædderen.

— * —